# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Friður á jørð

Stóri jólaboðskapurin er um frið á jørð. Boðskapurin hevur verið endurtikin aftur og aftur, men tað er synd at siga, at hann hevur eyðkent heimssøguna. Orsøkin man vera tann, at tá ið tað í jólaboðskapinum verður tosað um frið á jørð, so verður eisini tosað um góðan tokka í menniskjum.

Tað hevur ikki júst hevur verið góði tokkin, ið hevur ligið fremstur. Heldur hevur tað verið trongdin eftir at ala at sær og skava inn undir seg, sum hevur verið drívmegin, ið hevur verið so sterk, at ofta hevur verturin verið lagdur í, um tað hevur gingið út yvir onnur. Kring heimin hava mong ligið órætt av hesum, og soleiðis er tað framvegis.

2008 hevur ikki verið nakað undantak. Tað eru framvegis stríð og kríggj, og tað er framvegis soleiðis, at tjóðir, felagsskapir, fyritøkur og einstaklingar ikki duga sær hógv í strembanini eftir at vinna sær vald, ríkidømi og fyrimunir. Hesum bera framvegis tjóðir og einstaklingar byrðarnar av.

Tíbetur eru tað eisini tey, sum leggja nógv fyri í royndum at linna um og stimbra. Tað gera altjóða felagsskapir, og í og út frá landi okkara eru tey eisini fleiri, sum seta nógv og alt til síðis fyri at røkja sovornar uppgávur og avbjóðingar kring allan heimin. Hetta eiga vit at seta stóran prís uppá!

Familjan, sosial sambond og felagsskapur hava verið styrkir, ið hava eyðkent okkara samfelag. Tað er framvegis soleiðis, at familja og vinaløg hava stóran týdning í Føroyum, og høgtíðin er gott høvi at styrkja um bondini. Tað hevði heldur ikki verið av vegnum, um vit hugsaðu um og vitjaðu tey, sum eru løgd til síðis, og sum ikki hava førleika og umstøður til sjálvi at skapa hugnan, sum vit halda er so sjálvsagdur.

Fleiri túsund føroyingar í útlegd hava seinastu dagarnar aftur sett fótin á brimbardu klettarnar, sum eru okkum so kærir. Vit eru vælsignað við friði, fólkaræði, felagsskapi og so mongum øðrum, sum onnur leingjast eftir. Tað eiga vit at seta stóran prís uppá!

Tey, sum um høgtíðina eru í útlegd, hugsa um familjuna, føðilandið og felagsskapin. Samskiftismøguleikarnir eru betri enn nakrantíð, og vit vilja fegin vera við. Aftur í ár verður møguleiki hjá útisetum at senda jólaheilsan umvegis portalin.

Miðlahúsið, Sosialurin og Rás2 ynskja at heilsa øllum viðskiftafólkum okkara – heima og burturi – við ynskjunum um eini gleðilig og friðfull jól. Ikki minst hugsa vit um tey, sum síðani síðstu jól eru rakt av sorg og um tey, sum eru løgd til síðis orsaka av sjúku.

Gleðilig jól øll somul við ynskinum um, at vit øll gera okkara til at fjálga og lívga um hjá medmenniskjum okkara. Tá kunnu vit vera við til at fáa frið á jørð.

**Sosialurin**

## Onki klams til Trygd

**JEAN DJURHUUS**
Stjóri, Trygd

Dimma hevði á forsíðuni 18. desember eina søgu um, at Trygd skal hava fingið eitt klams frá Kappingarráðnum, tá Trygd boðaði kundunum frá, at felagið gevst við sjóvátryggingum, og at Tryggingarfelagið Føroyar var sinnað at tryggja skipini, tá tryggingarnar ganga út á nýggjárinum.

Dimma tykist halda, at Trygd átti at havt kunnað kundarnar um, at eitt íslendskt felag eisini var á marknaðinum.

Men her fer Dimma skeiv. Tá Trygd boðaði kundunum frá tann 8. desember, visti Trygd onki um, at eitt íslendskt felag fekk loyvi fýra dagar seinni, tann 12. desember, og Trygd kundi tí ikki boða kundunum frá hesum.

Dagin eftir søguna í Dimmu hevur Kappingarráðið í avgerðarskrivi góðkent, at Trygd gevst við sjótryggingum, eins og fráboðanina um, at Tryggingarfelagið Føroyar vil tryggja skipini, um kundarnir ynskja hetta. Kappingarráðið heitir samstundis á Trygd um at kunna kundarnar um, at íslendskt tryggingarfelag síðani 12. desember eisini hevur loyvi.

Av tí, at Trygd ikki visti um íslendska felagið, tá vit boðaðu kundunum frá tann 8. desember, síggja vit tað sum eina góða tænastu til kundarnar at boða teimum frá, at tað síðan 12. desember finst eitt alternativ til Tryggingarfelagið Føroyar á sjótryggingarøkinum.

Trygd hevur sostatt ikki gjørt nakað skeivt í hesum máli, sum forsíðan í Dimmu gav fatan av.

At enda ein lítil frágreiðing um, hví Trygd gevst við sjótryggingum.

Tað er umráðandi fyri tryggingarfeløg at spjaða skaðarnar á so nógvar kundar sum gjørligt, tí annars kunnu einstakir stórir skaðar raka ov meint í mun til inntøkurnar. Hetta er ikki minst galdandi fyri sjótryggingarøkið, har tryggingarupphæddirnar eru sera stórar.

Eftir at Trygd hevur virkað á sjótryggingarøkinum síðan 2001, mugu vit staðfesta, at vinnan ikki í nóg stóran mun hevur tikið undir við hesum parti av virksemi okkara, og tí hevur Trygd mett tað rættast at gevast við hesum virksemi.

Men hetta verður sjálvandi gjørt fyri at kunna nýta uppaftur størri orku upp á restina av virksemi okkara.

Síðani Trygd kom á marknaðin í 1998, hava føroyingar merkt fyrimunirnar av kapping, tí prísirnir á tryggingarmarknaðinum eru falnir munandi, og tænastan er vorðin betri. Felagið hevur støðugt styrkt støðu sína á marknaðinum og hevur í dag ein munandi marknaðarlut innan tryggingar til húsarhald og vinnu, og Trygd fer framhaldandi tryggja kappingina á marknaðinum.

## Krøv til fjølmiðlarnar

**ZAKARIAS WANG**



Føroyingar fíggja í dag ikki bert bløðini, sum bera okkum tíðindi, men eisini luftbornar fjølmiðlar. Umframt Kringvarp Føroya hava vit Rás 2 og Lindina.

Allir fjølmiðlar siga okkum nakað, sum hevur týdning fyri okkum í dag. Men tá løtan er farin, hevur tað, miðilin hevur boðað frá, áhuga hjá teimum, sum vilja síggja hvat ið hendi í gjár, í fjør og fyri hundrað árum síðani.

Teir prentaðu fjølmiðlarnir hava skyldu til at hjálpa teimum, sum hava slíkan áhuga. Teir skulu avhenda skyldueintøk til Føroya landsbókasavn. Tann, sum vil síggja hvat ið fjølmiðlarnir skrivaðu í februar 1902 kann fara út á landsbókasavnið og hyggja eftir hvat ið bløðini søgdu um tað ið tá fór fram.

Einki skuldi verið at ivast í, at okkara luftbornu fjølmiðlar hava somu skyldu. Men tann sum fer út á landsbókasavnið og vil fáa at vita hvat teir hava sagt, fær tað svar, at har er einki tilfar.

Hetta líkist ongum.

Vit borgarar í Føroyum, sum gjalda fyri fjølmiðlarnar, kunnu ikki lata okkum lynda, at vit ikki sleppa at síggja hvat ið hevur ávirkað tilveruna hjá teimum landsmonnum okkara, sum undan okkum hava verið. Vit mugu sleppa framat við øllum nútíðar tøkni at síggja, og hoyra hvat ið fólk sóu og hoyrdu, fyri at kunna gera okkara meiningar um í hvønn mun tað ávirkar okkum í dag.

Greitt er, at tann skylda, sum prentsmiðjur hava at lata eintøk til landsbókasavnið kostar hesum savni pening, tí tilfarið skal hava pláss, fólk skulu hava løn fyri at hava savnið opið og tilfarið atkomuligt.

Skal savnið fáa tilfarið frá fjølmiðlunum vera útreiðslurnar munandi størri.

Men sum er gjalda vit beinleiðis ein skatt sum fer til ein av hesum fjølmiðlum, nevnliga Kringvarpið. Hetta er ikki serliga væl í samsvari við ta høvuðsreglu, sum vit hava í samfelag okkara, at stuðul ikki skal vera kappingaravlagandi. Sama er at siga um tey eydnuspøl, sum hesin fjølmiðil hevur fingið frá tí politiska valdinum.

Fara hesar upphæddir til at varðveita tær almennu sendingar, sum hava ávirka okkum, so eru tær væl farnar, tí tá fáa vit skott millum tað almenna og tað privata. Allir fjølmiðlar hava tá skyldu til at lata tí almenna tað teir hava framleitt, so áhugaði kunnu hoyra og síggja tað.

Fyri fjølmiðlarnar kemur hetta eisini at vera ein fyrimunur. Sum er hava teir stríð av at goyma tær gomlu sendingarnar, sum teir meta kann hava áhuga hjá teimum seinni. Men tær farast, og nógvur kostnaður stendst av at royna at varðveita tær. Varð hetta flutt til tað almenna, so sluppu teir undan hesum útreiðslum, og harumframt lætti tað um hjá teimum at fáa fatur á sendingum, teir høvdu havt. Mangan er ringt at siga frammanundan, hvørjar sendingar ið fara at hava áhuga hjá seinni ættarliðum.

Sama er hjá bløðunum. Tey hava eisini áhuga í at tað verður léttari hjá teimum sjálvum at sleppa framat tí, sum hevur staðið í bløðunum fyrr, ikki bert fyri hundrað árum síðani, men eisini í síðsta mánað. Tað hevði borið til um tað almenna kundi fíggjað ein væl virkandi bókasavns- og dokumentatiónsdepil, ið legði dent á at veita almenninginum ta tænastu, sum tað hevði verið at gjørt tað stóra arbeiði, fjølmiðlafólk okkara avrika, atkomuligt hjá øllum borgarum.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen
karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Tróndur Skaalum trondur@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo
Bergur Johannesen bergur@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Harald í Kálvalíð harald@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $13^{30}$

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.